LØGMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Føroya Kærustovn

Við hesum verður søkt eftir stjóra til Føroya Kærustovn.

**Høvuðsuppgávur**
Føroya Kærustovnur leggur til rættis fyrireiking og avgreiðslu av kærumálum og samskipar og leggur til rættis virksemið hjá hesum kærunevndum:

- Kærunevndin í almanna- og heilsumálum
- Skatta- og avgjaldskærunevndin
- Kærunevndin í lendismálum
- Kærunevndin í útbúgvingarstuðulsmálum
- Vinnukærunevndin

Harafturat er Kærustovnurin skrivstova hjá skuldarumskipanarnevndini.

**Førleikakrøv**
Tað verður sett sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv, hollar løgfrøðiligar royndir og analytisk evni, og at teir hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

Harumframt verður sett sum treyt, at teir hava hollar royndir frá almenna og / ella privata arbeiðsmarknaðinum.

Umframt hetta verður væntað, at umsøkjarar duga og hava áhuga fyri leiðslu.

**Løn og setanartreytir**
Starvsheitið er stjóri, og verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá tænastumonnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir vera sambært avvarðandi sáttmála.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

*Løgmálaráðið*
*Postrúm 159*
*Tinganes*
*110 Tórshavn*

og skulu vera Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi tann 1. august 2008.

Umsøkjarar kunnu fáa nærri upplýsingar um starvið við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra, tlf. 358080.

---

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir løgmáláráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til kærunevndina í almanna- og heilsumálum, skatta- og avgjaldskærunevndina, kærunevndina í lendismálum, kærunevndina í útbúgvingarstuðulsmálum, og vinnukærunevndina. Harumframt er stovnurin skrivstova hjá skuldarumskipanarnevndini. Á stovninum starvast í løtuni átta fólk: stjórin, tríggir løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.






# Lærarastarv í Kaldbaks skúla

*(endurlýsing)*

Kaldbaks skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2008/09 vegna avlopstímar og serligan tørv umleið 24-26 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- eru fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- verða við áhaldandi at menna skúlan
- er stundisligur og nærlagdur

Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í fleiri av hesum lærugreinum so sum donskum, enskum, heimstaðarlæru, kristni, náttúru og tøkni og rokning.

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastarvið verður sett sum sáttmálasett starv. Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2. Starvið verður sett sum tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2008/2009.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v., avrit av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera fyrstalærara Ragnari J. Magnussen, Hagagøtu 5 á Argjum, í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 18. juli 2008 kl. 12.00.**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til: Kaldbaks skúla 515398 ella um teldupostadressuna kaldbak@skulin.fo.

**Kaldbaks skúli**
180 Kaldbak

---

Kaldbaks skúli hevur komandi ár um 30 næmingar úr 1. til 7. flokk. Á skúlanum starvast í løtuni 4 lærarar. Í 2003 varð skúlin høvuðsumvaldur og bygt varð afturat verandi skúla. Sera góðar hølisumstøður til næmingar og lærarar. Skúlin er væl útgjørdur við undirvísingaramboðum og -tilfari.

YR

[illegible]

Til våre trålere søker vi etter

## Førstemaskinister og maskinassistenter

[illegible]

# ÚTBJÓÐING

Við hesum verður boðið út í almennari lisitatión í høvuðsentreprisu bygging av nýggjum dagstovni og frítíðaskúla i Kvívík.

**Høvuðsarbeiðstøkan umfatar:**

1. Jørðarbeiði
2. Kloakkarbeiði og installatiónir
3. Betongarbeiði
4. Timbur- og snikkaraarbeiði
5. HVS og ventilatión
6. Múraraarbeiði
7. Málaraarbeiði
8. Golvalegging
9. El-inleggingararbeiði

Bílegging av útbjoðingartilfarinum er í seinasta lagi **31. juli 2008.**

Tilfarið verður latið teimum bjóðandi digitalt móti einum veðhaldi kr. 5.000, ið skal flytast á konto hja Kvívíkar kommunu í peningastovni.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjoðingartilfarið er latið inn aftur til kommununa í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, í sama standi sum tað varð útflyggjað.

Lisitatiónin er ásett av verða **hosdagin 4. september 2008 kl. 15:00** á kommunuskrivstovuni.

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 4 • FO-340 Kvívík**
**Tlf. 421294 • e-mail: kvivik@kvivik.fo**

INPACT

# SUMMARFRÍ

Vit fara í summarfrí tann 14. juli og byrja aftur tann 4. august. Skrivstovan verður stongd í hesum tíðarskeiði.

P/F Grannskoðaravirkið INPACT
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn
telefon: 31 47 00; telefax: 31 38 15
heimasíða: www.inpact.fo
t-postur: inpact@post.olivant.fo

**Member of international network of professional accountants**

# Stongt

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá 17/7-08 til 7/8-08, báðar dagar íroknaðir.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**